# Jólakalendarin 2006

## Við ommu á kavaskutara



Trøllapætur hevði hostað illa um náttina og best var at halda seg innandura hendan dagin. Tað var fjálgt og hugnaligt at sita á bríkini og stara inn í eldstaðin. Trøllaomman var einsamøll í býnum og Trøllapætur var so smátt farin at ótolnast nær omman fór at koma aftur.

"Bara hon ikki hevur gjørt nakað býtt" mutlaði Trøllapætur fyri seg sjálvan og hugsaði um tær mongu ferðirnar Trøllaomman fann uppá okkurt, sum ikki var loyvt at gera. Einaferð hevði hon lánt eina motorsúklu og hann var tá sloppin at sita uppi á aftanfyri. Tað hevði bæði verið ein góður og ein ringur dagur. Á veg oman úr fjøllinum var Trøllapætur farin uppum eitt hegn, men hann var so óheppin at hann kroysti halan og noyddist at fara á sjúkrahúsið. Á, tann neyð, sum tá var. Men omman var ófør sum altíð. Hon kláraði bæði sjúkraflutning og at binda halan inn, soleiðis at hann ikki fekk nakað varandi mein. Ímeðan Trøllapætur soleiðis sat og hugsandi, hoyrdi hann eitt ljóð, sum kom nærri og nærri.

V R U U U M M M BRUUUUUUMMMM RUUUUUMMMMM BUMMM BUMMM

Hvat var hatta?

Trøllapætur leyp upp og hugdi út ígjøgnum eitt lítið op í trøllasmáttuni. Oy oy oy og pílar í skot! Har kom omman við fullari ferð niðan bakkan. Hon stóð á einari stórari motorsletu, sum larmandi ók ígjøgnum kavan.

– Hallóv hallóv, Trøllapætur. Nú eri eg heima aftur, skrálaði trøllaomman ovurfegin aftan fyri róðrið. Hon parkeraði ta løgnu maskina beint við dyrnan. Trøllapætur læt hurðina upp og rysti við høvdinum.

– Omma, omman. Hvat hvat er hatta fyri nakað?

– Hatta er bara ein kavaskutari... Omma hevði keypt so nógvar gávur, at eg orkaði ikki at sleipa allar til hús. Omma sá skutaran uttanfyri barnagarðin, og tá eg spurdi ein litlan fittan drong um eg kundi sleppa at lána hann, nikkaði og smíltist hann. So, tað var gamaní.

Trøllapætur visti, at nú var aftur galið. Tað næsta varð, at Erling politistur fór at leita eftir kavaskutaranum og tað fór ikki at verða gamansleikur, um hesin varð funnin uttanfyri trøllasmáttuni. Nei, tað mátti ikki verða at omman endaði í brummuni á jólum.

–Tú mást skunda tær at koyra skutaran uppá pláss aftur, omma. Ongin lítil drongur í barnagarðinum eigur eina so ógvusliga maskinu....!

Omman hugsaði so hárini stóðu beint uppeftir høvdinum.

– Ja, góði, so gera vit tað meðni. Men fyrst mugu vit bera jólapakkarnar inn og lata lúkuna upp. So skal omma drøna omanaftur í býin og seta skutaran har eg tó....eg meini, lánti hann.

Trøllapætur var ikki sørt bilsin tá hann lat lúkuna upp.

– Hygg, ein stórt reytt hálsturruiklæð, omma!

Omman hugdi eitt sindur forpøst at Trøllapætur, sum í somu løtu hevði fingið eitt frálíkt hugskot.

Hann kendi seg longu betri og hann hostaði ikki meira.

– Omma, eg vil eisini sleppa at royna at sita á kavaskutara. Kom omma, lat okkum skunda okkum, áðrenn Erling politistur verður boðsendur....

– Ja, góði. Tað er av allarbesta kavaveðri nú, og tú aftur fingið reyðar og vakrar kjálkar, vinur mín. Kom so fara vit bæði ein túr í kavanum.

Trøllapætur helt fast í ommuni. Og Trøllaomman dugdi at koyra, eisini kavaskutara.

VRUUUUMMMMMMM VRUUUUUUMMMMMMMM!








Minst til í dag...



Minst til at skifta battaríini
á roykvarnaranum í dag

TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR
- so ert tú tryggari